SUNDA KOMMUNA

## Lærarastarv við Hvalvíkar skúla

Søkt verður eftir lærara til Hvalvíkar skúla frá
**1. oktober 2007 – 28. juni 2008.**

**Lærugreinir:**
- Føroyskt í 3. flokki
- Heimstaðarlæra í 3. flokki
- Kristni í 3. flokki
- Rokning í 1. og 2. flokki
- Heimstaðarlæra í 1. og 2. flokki

**Søkt verður eftir lærara, sum:**
- Undir ábyrgd leiðslunnar og í samstarvi við lærarar skúlans, skal undirvísa og taka lut í dagliga arbeiði skúlans
- Dugir at samstarva og er fyrikomandi
- Er fúsur at taka á seg uppgávur og avbjóðingar, ið eru á skúlanum
- Vil vera við til framhaldandi at menna skúlan

**Førleikakrøv:**
Tann, ið settur verður, skal hava læraraútbúgving. Um eingin við útbúgving søkir, verður annað fólk sett í staðin.

**Lønar- og setanartreytir:**
Starvið er parttíðarstarv, 20 tímar um vikuna, og verður lønt í lønarflokkunum 18.1 – 27.4 sambært avtalu millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Lærarafelag.

**Umsóknir:**
Umsóknir saman við avriti av prógvi og møguligum viðmælum skulu verða skúlanum í hendi í seinasta lagi **mánadagin 17. september, kl. 12.00.**

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Aslaug Olsen, skúlaleiðara, á telefon 422028 – 607551 ella 222475.

**Umsóknir vera sendar til:**
**Hvalvíkar skúla**
Skúlavegur 1
430 Hvalvík

*Hvalvíkar skúli hevur komandi ár uml. 45 næmingar og 6 lærarar. Skúlin er ein 3-flokkaður skúli við næmingum í aldrinum 1.-7. flokk.*

TVØROYRAR KOMMUNA

## Søkt verður eftir dagrøktara

Dagrøktarskipanin í Sumbiar kommunu søkir eftir dagrøktara, at byrja skjótast gjørligt.

**Vir ynskja at tú:**
- Hevur góðar umstøður at ansa børnum inni og uttanfyri.
- Tekur ábyrgd og kanst arbeiða sjálvstøðugt.
- Vísir virðing fyri børnum, foreldrum og starvsfeløgum.
- Ert álítandi og hevur góð samstarvsevni.
- Ert tolin og vísir umsorgan.
- Hevur hegni og áhuga í at menna børnini.
- Dugir at síggja møguleikar í staðin fyri forðingar

Í dagrøktarskipanini starvast 2 dagrøktarar og ein leiðari.
Talið av børnum í dagrøktini er 11.

Frá mánadag til tórsdag eru dagrøktarmammurnar í spælistovuni hvønn seinnapart

Arbeiðstíðin er millum 7.30 – 17.15.
Lønin er millum FA og KAF.

Nærri fæst at vita um starvið við at ringja til tlf. 21.13.39 og tosa við Súsannu Poulsen dagrøktarleiðara

Vinarliga send umsókn tygara til:

**TVØROYRAR KOMMUNU**
**Dagrøktarskipanin**
**800 Tvøroyri**

SANKTA JÓSEFS BARNAGARÐUR

## Sankta Jósefs barnagarður søkir eftir leiðara:

1. Januar 2008 fer leiðarin hesi seinastu 40 árini úr starvið vegna aldur. Søkt verður tí eftir fólki at taka við leiðarastarvinum í Sankta Jósefs barnagarði.

Sankta Jósefs barnagarður er ein sjálvsognarstovnur, ið hevur virkað í 76 ár. Í stovninum eru 17 starvsfólk. Av hesum seytjan hava 10 námsfrøðiliga útbúgving. Barnatalið er 82.

- Leiðarin kemur at hava tað námsfrøðiligu og fíggjarligu ábyrgdina av stovninum.
- Starvið er lønt sambart Føroya Pedagogfelag og KAF í lønarstiga 23-29.

**Vit sóknast eftir fólki, ið**
- Hevur námsfrøðiliga útbúgving
- Hevur hug og hegni at átaka sær leiðarastarv
- Dugir at samstarva við "stór og smá"
- Er fyrikomandi

Heldur tú, at hetta er eitt starv fyri teg, send so eina umsókn til:

**Sankta Jósefs Barnagarð**
Att. Nevndin
Varðagøta 12
100 Tórshavn

Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til leiðaran: L. Smets tlf. 312854.

**Umsóknarfreistin er 1. oktober 2007.**

## WELLNESS GRUPPE REJSER TIL POLANICA

Med Danuta som guide/tolk
Fra 23.sept til 9.okt.

Fly fra Kastrup,1/1 pens. 3 behandlinger pr.dag
**Pris 7.500 kr i dobbelt værelse**



**Rejsehuset 0045 39901390**
**www.rejsehuset-rejser.dk**
**Fonn Flog 45636**

## FRÆLSUR ÍTRÓTTUR

fyri børn 6-8 ár (født 1999-2001)

**Tilmelding:**
Mánadagin 10. sept. kl. 17-19 í ÍSF-Húsinum

Mikudagin 12. sept. kl. 18-19 í fimleikahøllini í Tórshavnar Kommunuskúla
(fyrsti tími er 12. sept.)
Avmarkað luttøka: 30 børn.

Kostnaður: 500 kr*
(250,00 kr er limagjald og 250,00 kr er venjingargjald)

**Leiðarar:**
Randi Kúrberg,
Heri Ziska og
Røgvi Højgaard.



* Tey, sum gjalda kontant, verða tikin fram um, um bíðilisti kemur upp á tal.

## VOLVO S40 CLASSIC TIL SØLU



1,8 ltr motor, leðurkabinu, fartpilot, fløgumagasin o.m.a.

Eitt sett av sportfelgum við dekkum fylgja við. Bilurin er frá sept 2003.

**Prísuppskot 160.000 kr**

*Telefon: 45 70 23 ella 22 33 01*